## Bað um umbering

Í Kanada hevur Stephen Harper, forsætisráðharri, biðið landsins upprunafólk, sum eru indiánar og inuittar, um umbering fyri, at tað almenna noyddi teirra børn at búgva á almennum, kristnum kostskúlum líka frá 1870-unum til 1970-ini. Á einari hátíðarligari løtu í tjóðartinginum bað hann umboð fyri indiánar og inuittar um umbering. Í sama viðfangi boðaði hann frá, at stjórnin fer at rinda ofrunum og teirra avvarðandi 23 mia. krónur í endurgjaldi.



*Indiánahøvdingi í kanadiska tjóðartinginum*
*Mynd: Polfoto*

## Rýpan nørist

Í mong ár hava íslendingar skotið rýpu, men tey seinastu árini hevur veiðan verið avmarkað til fýra dagar í novembur, tí kanningar høvdu víst, at rýpan var farin at minka. Nú vísir ein nýggj teljing hjá Náttúrufrøðistovninum, at afturgongdin er hasað av, og at rýpan nørist aftur. Stovnurin sigur, at tað er serliga har eysturi í landinum, at rýpan er komin fyri seg, meðan støðan er óbroytt vestanfyri. Tað endaliga talið kemur í august mánaði.

# Minni enn helvtin av teimum lesandi koma heim aftur

**Einans 44 prosent av teimum, sum fara av landinum at lesa, koma heimaftur, vísir ein spildurnýggj kanning, sum Stuðulsstovnurin hevur latið gjørt**

ÚTBÚGVING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*Anna V. Ellingsgaard*
*Sosialurin/Rás2*

Færri enn helvtin av teimum føroyingum, sum fara uttanlands í útbúgvingarørindum, koma heim aftur til Føroyar eftir loknan lestur.

Tað staðfestir ein nýgg og sera umfatandi kanning, sum fevnir um allar føroyingar, ið vóru lidnir við eina útbúgving í tíðarskeiðnum 2004 til 2006.

Kanningin varð løgd fram á ráðstevnu hjá norðurlendskum lestrarstovnum í gjár. Við kanningini, ið Stuðulsstovnurin hevur latið gjørt, ber sostatt fyrstu ferð til at staðfesta, hvussu nógvir lesandi føroyingar uttanlands velja at koma heim aftur.

### Kemur óvart á

Terji á Lakjuni, stjóri á Stuðulsstovninum, vísir á, at vit jú longi hava vitað, at føroyingar í stórum tali fara uttanlands at nema sær útbúgving. Hinvegin kemur tað rættiliga óvart á hann, at meir enn helvtin av hesum føroyingunum velja at vera verandi uttanlands.

- Hetta talið verður lutfallsliga sera stórt, tá vit vita, at heili 60 prosent af øllum lesandi føroyingum taka sína útbúgving uttanlands. Í eitt nú Danmark og Finlandi fara bara 2 prosent av landinum at taka eina útbúgving, og tí verður talið á teimum, sum møguliga ikki koma heimaftur, heldur ikki so lutfallsliga stórt, sum í Føroyum, sigur Terji á Lakjuni.

Til samanberingar kann nevnast, at í Íslandi fer ein fjórðingur av teimum lesandi av landinum at taka útbúgving, meðan á leið 16 prosent koma aftur aftaná loknan lestur.

### Hægst útbúnu verða verandi uttanlands

Jacob Mouritz Olsen, lesandi við Åalborg Universitet, hevur gjørt kanningina fyri Stuðulsstovnin. Hann vísir á, at tað eru fleiri úrslit og ábendingar í kanningini, sum benda á ein heldur óhepna gongd.

- Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at Føroyar er tað landið, ið útflytir flest lesandi og fær fægst av teimum heimaftur, samanborið við hini norðurlondini. Haraftur-at vísir kanningin, at tað serliga eru tey, við teimum hægstu útbúgvingunum, sum verða verandi uttanlands, sigur Jacob Mouritz Olsen.

### Ikki so einfalt

Terji á Lakjuni heldur tað vera sera áhugavert, at vit nú fyri fyrstu ferð hava neyv tøl at halda okkum til, tá talan er um, hvussu nógvir lesandi føroyingar velja at koma heimaftur.

- Tað, at vit hava manglað tøl, hevur havt við sær, at hetta kjakið í stóran mun hevur verið merkt av gitingum og mytum. Nú ber betri til at fyrihalda seg til trupulleikan við møguligum loysnum – í tann mun vit also halda hetta vera ein trupulleika, sigur Terji á Lakjuni.

Hann leggur afturat, at kjakið um nógvu lesandi føroyingarnar í útlondum kanska hevur lyndið til at gerast í so einsháttað.

- Tað er jú hvørki nakað nýtt ella ónáturligt í, at ung fólk fegin vilja hava luft undir veingirnar og royna nakað nýtt. Tað halda vit eisini vera fínt, tí vit skulu helst øll vera partur av globaliseringini. Men vit vilja samtundis fegini hava so nógv av teimum ungu at koma heim aftur á klettarnar, so tað er ikki heilt einfalt, sigur Terji á Lakjuni, stjóri á Stuðulsstovinum.



*Stjórin á Stuðulsstovninum, Terji á Lakjuni, fegnast um, at vit nú fyri fyrstu ferð hava neyv tøl, ið vísa, hvussu nógvir lesandi føroyingar uttanlands koma heimaftur aftaná loknan lestur*

# Serlig skattaskipan kann bjarga flotanum

**Skal fiskiflotin hóra undan, sleppur tað almenna ikki undan at seta tiltøk í verk. Ein loysn er seta eina FAS-skipan í gildi fyri fiskiflotan á sama hátt sum fyri farmaflotan og Norrønu, sigur Marner Lisberg Reiðari**

FISKIFLOTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Skal tað eydnast at bjarga fiskiflotan, verður tað neyðugt, at tað almenna leggur upp í.

Tað ivast Marner Lisberg, reiðari á Suðringi, ikki í.

Suðringur er ein av teimum fáu lemmatrolaranunum, sum eru til fiskiskap.

- Tað, sum heldur lívið í okkum, er, at vit hava eina serliga kvotu av stinglaksi og langasporli, tí tað er ein fiskiskapur, sum tað hevur eydnast okkum at fáa at bera til.



*-Verður fiskiflotin lagdur, missa vit alt og tí ræður um at avmarka tapið, staðfestir Marner Lisberg, reiðari á Suðringi*

Reiðarin á Suðringi, staðfestir kortini, at støðan í fiskiflotanum er serstakliga álvarslig.

- Støðan í flotanum er so álvarslig, at trupulleikin kann ikki loysast við avtalum ímillum reiðarar og manningarfeløg um at lækka hýrurnar, ella okkurt av tí slagnum.

- Tað skal nógv meiri til, leggur hann afturat.

### Landsstýrið sleppur ikki undan

Reiðarin á Suðringi sigur, at skal fiskiflotin bjargast, sleppst rætt og slætt ikki undan, at tað almenna leggur upp í.

Sjálvur heldur hann, at ein nærliggjandi loysn er, at tað almenna setir eina FAS skipan í gildi fyri fiskiflotan, eftir sama leisti, sum tað almenna longu hevur sett í gildi fyri farmaflotan og Norrønu.

- Tað merkir, at ein partur av skattinum, sum manningarnar annars gjalda til samfelagið, verður borin aftur til skipini.

- Tað er tað einasta, sum munar, staðfestir Marner Lisberg.

### Samfelagið í undantaksstøðu

Hinvegin heldur hann, at tað ber ikki til at hyggja eftir fiskiflotanum, sum einum sjálvstøðugum trupulleika.

- Her er talan um ein álvarsaman samfelagsligan trupulleika og sum støðan er í løtuni, er alt samfelagið í undantaksstøðu.

- So hvørt, sum skipini verða løgd, steðga eisini allar vinnur, sum eru avleiddar av fiskiflotanum og tí er fyrst og fremst talan um arbeiði á fiskavirkjum, men talan er eisini um arbeiði í smiðjum, flutningsfeløgum, mekanikarum, montørum og øllum øðrum vinnum.

- Harafturat er tað ein staðfesting, at hvørt kilo av upsa, leggur fimm ella seks krónur eftir í samfelagnum.

- Sostatt er tað greitt, at verður fiskiflotin lagdur, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri alt samfelagið.

Marner Lisberg sigur, at afturgongdin fer fyrst og fremst at merkjast í fiskivinnuøkjunum úti um landið.

- Men tey, sum halda, at miðstaðarøkið sleppur undan, fara so dyggiliga skeiv, tí tey fara eisini at merkja sviðan, tá ið inntøkurnar til landskassan svíkja og sparingar tí mugu setast í verk.

- Sostatt er talan ikki um ein trupulleika, sum rakar einstøk virki ella einstøk øki í landinum.

Reiðarin á Suðringi sigur at tað, sum er mest hættisligt, er bara at lata standa til og onki gera, tí so eru vit vís í, at vit ongar inntøkur fáa.

- Tað er ongin ivi um, at talan verður um ein miss fyri samfelagið, men tað avgerðandi nú verður at avmarkað tapið mest møguligt.

Løgmaður hevur boðað frá, at hetta kann verða eitt gott høvi til at laga flotan til.?

- Tað ber væl til at sameina tað at fáa eina FAS skipan og at laga flotan til. Tey skipini, sum ikki fáa tað at bera til, fáa heldur onki úr FAS skipanini og tey koma so heldur ikki at klára seg og tí kunnu vit vænta eina tillaging undir øllum umstøðum.

- Og noyðast skipini at gevast at fiska, er tað so púra vist, at landskassin missir alla inntøkuna, sigur Marner Lisberg.